Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um studningslán til at byggja húsarhaldskúla í Klaksvík
(Hækka studningslánið og áseta stuðul til innbúgv og útbúnað)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um studningslán og stuðul til at byggja húsarhaldskúla í Klaksvík**"

2. Í § 1, stk. 1, 2. pkt. verður "21 mió. kr." broytt til: "37,3 mió. kr."

3. Aftan á § 1 verður sett:

"**§ 1 a.** Heimilað verður landsstýrismanninum at veita stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði, í mesta lagi 5 mió. kr. Treytin fyri at stuðulin verður latin er, at sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya fíggjar 50% av útreiðslunum til keyp av innbúgvi og útbúnaði.
Stk. 2. Umframt treytina í stk. 1 kann landsstýrismaðurin áseta aðrar treytir fyri at veita stuðulin, so sum útgjald av stuðli, krøv til at keypa innbúgvið, mannagongdir í samband við innheinting av tilboði oa.
Stk. 3. Ásetingarnar í §§ 2 og 3 eru ikki galdandi fyri stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði, sbrt. stk. 1."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 4. august 2022 við 24-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 4. august 2022

stjóri

LM-004/2022